## Um veðrið

Eg eri nokk so veðursjúkur. Eg royni at lata verða við at hugsa ov nógv um veðrið og siga við meg sjálvan, at vit búgva í Føroyum, men eg kann ikki lata verða. Myrka tíðin kann verða sera strævin at koma ígjøgnum.



## Um politikk

Eg eri ikki engageraður í politikki, men eg fylgi við. Vanliga øsi eg meg ikki um politikk ella politisk mál. Eg royni at fara á val, og um Føroyar nú gerast eitt valdømi, so kann eg fara á val í Havn og velja onkran í Runavík.

# sa ábyrgd



*Mær dámar leiðslustarvið, og eg royni altíð at verða tilvitaður um tað ábyrgd sum fylgir við, soleiðis at eg ikki bara buldri avstað uttan at hugsa um bæði tað beinleiðis og óbeinleiðis ávirkan, leiðara hava á starvsfelagarnar, sigur Hendrik Egholm. Mynd: Jens Kr. Vang*

## Fakta

**Navn:** Hendrik Egholm
**Aldur:** 33 ár:
**Familja:** Giftur við Anniku. Tey eiga tvær døtur á 4 og 2 ár. Fyrr í vikuni fingu tey ein son
**Bústaður:** Tórshavn
**Útbúgving:** Cand. Merc – marknaðarføring og leiðsla
Starv: Fráfarandi sølu- og marknaðarstjóri á Smyril Line. Stjóri á Føroya Shell frá 1. oktober

- Hóast tú sum leiðari eisini ert undir trýsti og kennir truplu støðuna, verður tú noyddur at trúgva upp á tað og royna at eggja starvsfólkið. Vit hava havt nøkur sera loyal og dugnalig starvsfólk á Smyril Line, og tað samanhald og samstarv, sum vit hava uppliva í felagnum, er nakað, sum tú ivaleyst bert kann uppliva, tá ið tú veruliga ert undir trýsti.

- Vit vistu væl, at vit vóru saman um uppgávuna, og tað skuldi ganga. Vit sóu øll, at støðan var ikki tann besta, men vit gjørdu alt fyri, at tað skuldi bera til – væl stuðlað av eigarunum hjá felagnum. Tað hava verið nógv fólk, sum hava arbeitt tætt saman fyri at tryggja framgongdina, men tað er heilt greitt, at tað eru vanligu starvsfólkini sum eiga størstu æruna fyri, at vend kom í. Tað er eingin sølu og marknaðarstjóri, stjóri ella fíggjarstjóri sum kunnu venda eini tílíkari gongd. Vit kunnu skapa karmar og seta eina kós út í kortið, men tað eru starvsfólkini sum fylla karmarnar út, og tað er teirra heiður at keðiliga gongdin er vend.

- Skal eg minnast á nakað serliga gott við tíðini á Smyril Line má eg nokk nevna tað framúr góða samstarv eg havi havt við fíggjarstjóran Rúna Poulsen, og tað samstarvið fari eg at sakna, nú eg skifti starv. Hann byrjaði í 2005 og var avgerandi spælari í at venda gongdini á Smyril Line.

### Strævið hjá familjuni

Seinastu árini hava verið hendingarík hjá Hendriki Egholm, tí samstundis sum hann var mitt í meldrinum á Smyril Line, kravdi familjan eisini sítt. Tvær smáar døtur vóru blivnar partur av familjuni, og tað kundi stundum verða trupult at fáa alt at passa saman.

- Eg vil siga, at serliga tann fyrsta tíðin á Smyril Line var strævin. Tað var nógv, sum vit skuldu betra og byggja upp av nýggjum, og tað kravdi nógva tíð og orku. Tað truplasta var tann nógva ferðingin, og tá var tað sera strævið hjá konuni, tí eg var so nógv burtur.

- Men tað gjørdist betur, so hvørt sum vit fingu nógv í fasta legu á Smyril Line, og framgongd eisini var í rakstrinum.

Nú hevur Hendrik Egholm so slept endanum á Smyril Line, sum í dag er í eini heilt aðrari støðu fíggjarliga. Felagið er væl fyri og kann nú av álvara líta frameftir. Stutt eftir at nýggjur stjóri var settur í felagnum, segði Hendrik seg úr sínum starvi.

- Onkur fólk hava spurt meg, um eg segði upp, tí eg ikki bleiv stjóri á Smyril Line, men tað hevur einki við sakina at gera. Smyril Line hevur fingið ein góðan stjóra, sum er sera væl egnaður til ta uppgávuna, sum nú liggur fyri framman, og eg kundi saktans hildið áfram sum sølu- og marknaðarstjóri í nógv ár afturat undir Andras Róin.

- Eg havi ikki søkt starv aðrastaðni, men eg fekk eitt tilboð um at gerast stjóri hjá Shell, og tað tilboðið var so mikið lokkandi, at eg tók av tí, sigur Hendrik Egholm, sum tann 1. oktober byrjar í nýggja starvinum.